

## Benjamin á Reinsarínum og í Losjuni í Gøtu

Í dag og sunnudagin verða tvær forvitnisligar konsertir við Benjamin v/bólki og gesta solosti. Gestasolisturin verur heimskendi saxofonisturin, Villu Veski úr Estlandi. Villu bleiv kosin „Best jazz artist 08“ í Estonian music awards og er eisini maðurin aftan fyrið størsta jazzfestivalin í Evropa, Muhu. Eins og Kristian Blak hevur Villu lagt nógva orku í at samansjóða europeiskar tónleikarar og hevur við hesum megnað at fingið eitt sermerkt norðurlendskt ljóð. Reinsaríið verður karmur um fyrstu konsertina í kvøld klokkan 21. Her fer Yggdrasil at byrja og síðani Benjamin. Næsta konsertin verður í Losjuni í Gøtu, hon verður sunnudagin klokkan 20, og her verður bert konsert við Benjamin. Umframt Benjamin Petersen á guitar vera nakrir av Føroya bestu tónleikarum við honum. Brandur Jacobsen trummur, Mikael Blak bass, Gunnar Guttesen klaver, Ólavur Olsen trompet og sjálvandi Villu Veski saxofon.

# Gongst væl hjá Atlantic Petroleum

**Jaligt úrslit frá suður Chestnut, nýtt frá Chestnut oljuleiðini, og luttøka í 3. føroyska útbjóðingarumfari sigur Atlantic Petroleum í tíðindaskrivi**

OLJUFRAMLEIÐSLA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

5. november 2008 - Atlantic Petroleum fráboðaði í gjár nýtt um gongdina á Chestnut leiðini, ið felgið eigur 15% í, og at felagið hevur latið inn umsókn í 3. føroyska útbjóðingarumfari.

Kanningararbeiðið av seinnametingar/framleiðslubrunninum, suður Chestnut, ið varð boraður í septembur 2008, er nú liðugt. Hægsta royndarframleiðsluferðin varð máld til 9.000 tunnur um dagin (boepd), men settu royndartólini avmarkingar fyri einum hægri tali. Kanningar vísa at brunnurin hevur samband við høvuðsoljugoymsluna, og tí kann vatninnsprænigar-brunnurin, ið varð boraður í 2006, nýtast í framleiðsluni úr suður Chestnut.

Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum sigur:

“Okkara partaeigarar kunna fegnast um, at úrslitið frá suður Chestnut brunninum er sera jaligt. Hesin brunnurin verður annar framleiðslubrunnurin á leiðini, og verður hann knýttur uppí framleiðslukervi tíðliga komandi ár. Hetta veksur týðandi um virði á leiðini. Harafturat gongur framleiðslan úr Chestnut leiðini sera væl í hond, og onnur lastin av olju er nú avskipað. Eisini fegnast felagið um luttøkuna í 3 útbjoðingarumfari, har Atlantic Petroleum, saman við StatoilHydro, DONG og Faroe Petroleum, hava latið inn umsókn um leitiøki við Føroyar.”

Tann flótandi framleiðslupallurin (FPSO) Sevan Hummingbird, ið verður nýttur á Chestnut leiðini, hevur longu framleitt útvið 500.000 tunnur av olju, við eini miðal dagsframleiðslu á 12.000 tunnur (boepd), svarandi til 1.800 tunnur um dagin til Atlantic Petroleum. Hóast okkurt smávegis arbeiðið á pallinum ikki var heilt liðugt tá framleiðslan byrjaði, so hevur hetta ikki darvað framleiðsluni.



*Sevan Hummingsbird, sum tekur olju upp fyri m.a. Atlantic Petroleum*

### Chestnut leiðin

· Chestnut leiðin er ein av teimum elstu óútbygdu leiðunum í Norðsjónum. Leiðin varð funnin í 1986.

· Chestnut liggur um 180 kilometrar eystanfyri Aberdeen, á 120 metra dýpi, og 13 kilometrar í ein landsynning úr Alba oljuleiðini.

· **Samstarvsfeløg eru:**
o Venture Production plc (fyristøðufelag) – 69,875%
o Bow Valley Petroleum (UK) Limited – 15,125%
o Atlantic Petroleum UK - 15%

· Atlantic Petroleum keypti 15% í Chestnut leiðini í 2003.

· Útbyggingarætlanin fyri Chestnut leiðina varð góðkend í 2005, við einum útbyggingar- og einum vatninnsprænigarbrunni.

· Vatninnsprænigarbrunnurin (22/2a-12) varð boraður í 2006, og hevur hann gott trýstsamband við framleiðslubrunnin.

· Fyrsta oljan varð framleidd 22. september 2008.

**Sevan Hummingbird**

· Hummingbird pallurin er ein Sevan 300 FPSO (floating production storage and offloading vessel), við einum goymslukapasitetið á 270.000 tunnur. Eindin kann framleiða 30.000 tunnur av olju um dagin, og kann spræna inn 20.000 tunnur av vatni um dagin.

# J-dagurin er í morgin

**Føroya Bjór sendir tvey sløg av jólaøli á marknaðin í morgin, Jólabryggj frá Føroya Bjór og Jólatrøllið hjá Restorff’s**

ØL

J-dagur er dagurin, tá jólabryggið kemur út. Jólabryggj frá Føroya Bjór og Restorff’s Jólatrøll koma út í morgin 7. november. Jólabryggj er heldur dimmari bjór. Smakkurin er fírskur, kryddaður við góðum malt- og humlusmakki.

Jólabryggið frá Føroya bjór, ið er tað góða gamla




vit kenna, hevur í fleiri ár vunnið heiðurin sum tað besta í kongaríkinum. Restorff’s Jólatrøll er ein meira kryddað bjór.

Fýra føroysk jólabryggj koma á marknaðin í ár. Seinni í ár koma tvær meira kryddaðar jólabjór, bert bryggjað í avmarkaðari nøgd. Hesi eru bryggjaði eftir belgiskum íblástri við fleiri spennandi natúrkryddaríum umframt úrvaldari humlu og eisini Kvann, sum føroyskt krydd í aðrari.

Talan er um eina Green Islands Special og X-MAS 1888. Hesi sløgini hava meira fyllu í smakkinum.

- Jólabryggj riggar væl til ræst kjøt, riv og allan góðan føroyskan mat. Eisini til gás ella fleska- og oksasteik. Til kryddaðan mat riggar jólabryggj eisini, men kann eisini bara njótast í góðum selskapi, sigur Føroya Bjór í tíðindaskrivi. Til jóla ber til at keypa gávupakkar og smáar trækassar við ymiskum bjór sløgum.